# EITT TÍÐARHÓSKANDI SAMFELAG

FRAMSÓKN LIBERALI TJÓÐSKAPARFLOKKURIN

# Poul Michelsen

Yrki: Løgtingsmaður og floksformaður

Aldur: 71 ár

Bústaður: Tórshavn



# GÓÐU FØROYINGAR

Nýggjar tíðir elva til nýggjar avbjóðingar. Nýggjar avbjóðingar rópa eftir nýggjum loysnum. Nýggjar loysnir krevja nýhugsan.

Tíðin er runnin undan teimum gomlu ismunum. Hon er runnin undan vinstra og høgra og borgarligum og sosialistiskum. Hon ger alt stríð millum miðstaðarøkið og útjaðaran høpisleyst, og hon ger skilnaðin millum sonevnd gudilig og ógudilig vandamiklan.

Allur hesin skilnaðurin møtir ikki dagsins avbjóðingum. Han ger ikki annað enn at krógva okkum burtur í avlæstar básar, haðani vit ikki røkka hvørjum øðrum, og haðani vit ikki fáa samstarvað.

Í Framsókn ynskja vit at knýta politisk bond við tey, sum vilja byggja einar Føroyar, sum megna at kappast við onnur lond um tað skapandi og virkisfúsa fólkið – bæði um tey, sum longu búgva her, og um útisetar og onnur, sum kunnu koma higar at ríka okkara samfelag. Vit nevna hetta tað tíðarhóskandi samfelagið.

Undir hesum heitinum bjóðar Framsókn seg fram til komandi løgtingsval. Undir tí ynskja vit at lýsa, hvussu týdningarmikið tað er fyri allan framburð og menning í Føroyum, at vit geva tjóðarfrælsinum, vinnufrælsinum og tí persónliga frælsinum neyðugu rúmdina.

Vit vilja, at Føroyar taka ábyrgd av sær sjálvum, og at vit gerast ein sjálvberandi, frælsur og sjálvstøðugur limur í heimsfelagsskapinum.

Vit vilja, at Føroyar fáa ein betri samfelagsbúskap, og at vælferðin verður ment og tryggjað. Tað krevur, at tann frælsa vinnan fær størri ávirkan á samfelagsbúskapin, og at høvðusvinnurnar verða riknar eftir marknaðarbúskaparligum fortreytum.

Vit vilja, at Føroyar gerast rúmligari, og at virðingin fyri persónliga frælsinum kann broyta og beina burtur forboð og forðingar, sum ein minniluti av fólkinum hevur tikið sær rættin til at áseta.

Vit hava eitt fjølbroytt lið av kvinnum og monnum, sum bera hendan felags boðskapin fram fyri tykkum. Vit fevna víða í bæði aldri og førleikum, men vit hava øll tað til felags, at vit byggja okkara politiska arbeiði á virðisgrundarlagið hjá Framsókn.

Við einum inniligum ynski um, at vit megna at flyta politisk mørk og soleiðis skapa vøkstur, tryggleika og trivnað í einum tíðarhóskandi samfelag, biðja vit um undirtøku tykkara á komandi vali.

# EITT TÍÐARHÓSKANDI SAMFELAG

er eitt føroyskt samfelag, sum megnar at kappast við onnur framkomin lond um tað virkisfúsa og skapandi fólkið - bæði tey, sum longu búgva og virka her, og útisetar og onnur, sum kunnu koma higar at ríka okkara samfelag.

Tað er í strembanini eftir at standa á egnum beinum – sum menniskju og sum samfelag – at vit fáa størsta framburðin. Týdningarmestu ýtini hjá Framsókn eru tí persónliga frælsið, vinnuliga frælsið og tjóðskaparliga frælsið. Vit kjølfesta alla okkara politisku stremban í hesi frælsi.

## PERSÓNLIGA FRÆLSIÐ

Øll menniskju skulu hava somu rættindi at liva og virka í Føroyum uttan mun til kyn, uppruna, trúgv, sosiala støðu ella kynsligan samleika. Hvør einstakur skal hava allarbestu umstøður at brúka síni evni, at fylgja sínum málum og at virka so frítt, sum tilber – sær sjálvum og samfelagnum at gagni. Bara fræls menniskju kunnu av álvara taka ábyrgd av sær og sínum. Framsókn arbeiðir tí fyri at gera samfelagið rúmligari og at beina burtur óneyðugar forðingar og forboð, sum ein meiriluti – og viðhvørt enntá ein minniluti – hevur loyvt sær at áseta móti øðrum.

Vit berjast millum annað fyri rættinum hjá tí einstaka til sjálv ella sjálvur at velja sær sín lívsmaka. Vit stríðast fyri at sleppa av við óneyðugt alment formyndarí, sum millum annað forðar húsarhaldsvinnuni at gera føroyskan mat og føroyingum yvirhøvur at keypa øl og vín í handlunum. Vit virka fyri, at privata frælsið ikki skal verða nervað av ágangi frá yvirgangsbólkum, men vit vilja samstundis tryggja, at hóttanin um yvirgang ikki gevur myndugleikunum eitt skálkaskjól til at gera óneyðuga stór inntriv í privatlívið hjá fólki.

## VINNULIGA FRÆLSIÐ

Vinnulívið er búskaparliga grundarlagið undir samfelagnum. Meginreglan skal vera, at tað skal rekast í privatum høpi. Tað almenna skal avmarka sín leiklut so nógv, sum tilber. Privati búskapurin skal vaksa í mun til almenna búskapin eins væl og í sjálvum sær. Vit skulu hava fleiri nýggjar vinnur. Men fremst av øllum mugu vit tryggja, at miðleingjan í búskapinum – fiskivinnan – verður liberaliserað eftir einum skipaðum leisti og

síðani rikin eftir marknaðartreytum.

Framsókn fer at leggja stóran dent á at fáa eina nýggja fiskivinnuskipan at virka frá 1. januar 2018. Hon skal vera munandi meira handilslig enn núverandi skipan, men hon verður sett í verk eftir einum greiðum skipaðum leisti. Vit leggja dent á framhaldandi at menna ferðavinnuna, at fáa útflutningskrónur burtur úr skapandi listini og at fáa nógv størri nýskapan og íverkseting burtur úr føroyskum kjarnuførleikum, millum annað matvøruvinnuni og heimsins besta sjómansskapi.

## TJÓÐSKAPARLIGA FRÆLSIÐ

Vit eiga at byggja tjóð í einum og øllum, sum vit takast við. Tað er í strembanini eftir at standa á egnum beinum, at vit fáa tann størsta framburðin. Framsókn vil, at Føroyar gerast fullveldi og fullgyldigur limur í altjóðasamfelagnum við øllum teimum rættindum og skyldum, sum tað ber í sær. Fyrsta stigið er, at vit einaferð fyri allar staðfesta, at í Føroyum ræður Føroya fólk. Harafturat mugu vit tryggja, at búskapurin, mentanin, sosialu viðurskifti okkara og náttúra og umhvørvi eru burðardygg og framtíðartryggjað.

Vit fara at legggja stóran dent á at gera nýggju stjórnarskipanina lidna. Vit fara at virka fyri einum sterkum føroyskum uttanríkispolitikki við egnum aðalráði og uttanríkisráðharra. Vit fara at yvirtaka útlendingamál. Vit fara at tryggja, at viðkvæmar upplýsingar um føroyingar og føroysk viðurskifti verða goymdar í Føroyum og ikki hjá útlendskum KT-veitarum. Vit ætla at yvirtaka fyrisitingina av føroyska loftrúminum. Ásannandi at okkara fremsta tilfeingi er fólkið í landinum - føroyingar og onnur, sum koma higar at búgva og virka - fara vit at føra ein miðvísan útbúgvingar- og mentanarpolitikk. Vit ynskja at framtíðartryggja land okkara við at føra ein búskapar- og fíggjarpolitikk, sum virkar móti skuldarbinding og sveiggjunum í búskapinum, og við at fara væl um umhvørvið og í vaksandi mun at brúka varðandi orku.

Politisku málini eru mong, og vit fáa ikki nevnt tey øll á hesum staði. Í hesum lítla bóklinginum viðgera vit nøkur av teimum týdningarmiklu málunum, sum Framsókn leggur dent á at loysa fyri at økja persónliga, vinnuliga og tjóðskaparliga frælsið – og soleiðis at skapa og varðveita eitt tíðarhóskandi samfelag.

# PERSÓNLIGA FRÆLSIÐ

Øll menniskju skulu hava somu rættindi at liva og virka í Føroyum uttan mun til kyn, uppruna, trúgv, sosiala støðu ella kynsligan samleika. Hvør einstakur skal hava allarbestu umstøður at brúka síni evni, at fylgja sínum málum og at virka so frítt, sum tilber – sær sjálvum og samfelagnum at gagni. Bara fræls menniskju kunnu av álvara taka ábyrgd av sær og sínum. Framsókn arbeiðir tí fyri at gera samfelagið rúmligari og at beina burtur óneyðugar forðingar og forboð, sum ein meiriluti – og viðhvørt enntá ein minniluti – hevur loyvt sær at áseta móti øðrum.

## RÆTTURIN TIL AT VELJA EGNAN MAKA

Tey flestu okkara halda tað vera púra natúrligt, at vit sleppa at gifta okkum við tí makanum, sum vit elska, og í dag halda vit hánt um gamlar søguligar forðingar frá bóndasamfelagnum. Men okkara millum eru mong, sum enn ikki hava hendan rættin.

Framsókn virkar fyri, at samkynd eisini í Føroyum skulu kunna gifta seg borgarliga. Vit fara at broyta hjúnabandslógina soleiðis, at øll menniskju sjálvi sleppa at velja sær sin lívsmaka. Stundin er komin til, at vit fáa eina tíðarhóskandi lóggávu, sum eisini samsvarar við hugburðin hjá flestu føroyingum.

Vit taka frástøðu frá avgerðini hjá fráfarandi samgonguni um at nokta sínum tinglimum at atkvøða sambært egnari sannføring í spurninginum um broytingar í hjúnabandslógini. Tingfólk skulu ongantíð aftur takast av ræði í hesum týdningarmikla máli.

## EFTIRLIT VIÐ BIG BROTHER

Tað er ein grundleggjandi táttur í persónliga frælsinum at sleppa at halda privatlívið innanveggja. Myndugleikarnir mugu ongantíð leggja seg út í hetta privatlívið, um tað ikki er avgerandi neyðugt.

Vit eiga samstundis at gera alt, sum gerast kann, fyri at verja persónliga frælsið móti álopum frá aðrari síðu, herundir ágangi frá yvirgangsfelagsskapum móti lívi og førleikum. Hetta ber í sær, at myndugleikarnir í

summum førum mugu gera ávis inntriv í gerandislívið fyri at verja privata frælsið. Men hetta má ongantíð gerast í óðum verkum og heldur ikki í størri mun enn neyðugt.

Framsókn fer altíð at stuðla tiltøkum, sum verja borgaran móti yvirgangi. Vit fara tó samstundis at tryggja, at eingin myndugleiki brúkar hóttanina um yvirgang sum undanførslu til at tríva óneyðuga nógv inn í privatlívið hjá føroyingum, soleiðis sum vit hava varhugan av, at teir hava gjørt í summum londum. Vit fara at tryggja eitt sunt eftirlit við Big Brother.

## RÆTTURIN TIL AT GERA FØROYSKAN MAT

Matvørulógin er eitt dømi um høpisleyst og ráðaríkt formyndarí. Við hesi lóg í lummanum ganga myndug-leikarnir privata lívinum og virkseminum ov nær.

Við viti og skili má lógin megna at taka dagar ímillum vanliga húsarhaldsvinnu og handilsligan útflutning. Tá vit ferðast uttanlands, síggja vit í heilum, hvussu munurin millum húsarhaldsvinnu og stórrakstur ger, at lív og virksemi blóma kring familjurnar har.

Vit ætla at laga lógina soleiðis, at hon virðir siðirnar kring gamla og vælroynda føroyska matgerð og framleiðslu av matvørum.

## ØL OG VÍN Í VANLIGUM HANDLUM

Flestu føroyingar ynskja eisini at sleppa at keypa sær okkurt at drekka aftur við matinum - undir egnari ábyrgd og uttan at verða sett undir almenna fyrisiting. Sambært eini gallupkanning frá apríl 2014 vilja 64 prosent av teimum spurdu hava loyvi til at keypa øl og vín í vanligum matvøruhandlum. Hetta kemst av, at øl og vín í dag eru partur av matmentanini í nógv størri mun enn av eini drykkjumentan.

Framsókn virkar fyri, at matvøruhandlar skulu hava loyvi at selja øl og vín. Umframt at vit á hendan hátt sleppa undan almennu fyrisitingini av privatlívinum hjá fólki, kunnu handlarnir við hesum loyvi bøta um handilsliga grundarlag sítt. Føroyingurin fær eitt størri úrval og ágóðan av kappingini um prísin.

Hotellini og matstovurnar fáa eisini ítøkiligt gagn av hesi lógarbroytingini. Eitt er, at matstovurnar fáa eitt betri høvi at byggja upp síni egnu úrval. Annað er, at innflutningurin gerst bæði smidligari og bíligari. Í dag kannar almenna Rúsdrekkasølan sær eini 30 prosent í vinningi. Í flestu førum er hetta púra órímiligt í mun til avrikið.

Vit ætla eisini at tillaga heilidagslógina soleiðis, at hon sampakkar við eitt tíðarhóskandi samfelag.

# VINNULIGA FRÆLSIÐ

Vinnulívið er búskaparliga grundarlagið undir samfelagnum. Meginreglan skal vera, at tað skal rekast í privatum høpi. Tað almenna skal avmarka sín leiklut so nógv, sum tilber. Privati búskapurin skal vaksa í mun til almenna búskapin eins væl og í sjálvum sær. Vit skulu hava fleiri nýggjar vinnur. Men fremst av øllum mugu vit tryggja, at miðleingjan í búskapinum – fiskivinnan – verður liberaliserað eftir einum skipaðum leisti og síðani rikin eftir marknaðartreytum.

## HANDILSLIG OG BURÐARDYGG FISKIVINNA

Tað er bæði skelkandi og skomm, at fráfarandi samgonga ikki hevur havt vilja til og/ella megnað at arbeiða fram móti eini semju millum politisku flokkarnar um karmarnar kring høvuðsvinnuna frá og við 2018. Úrslitið er, at fleiri og fleiri nú tosa um at lata gomlu lógina um vinnuligan fiskiskap halda fram.

Tað er avgjørt neyðugt, at vit ikki skjóta broytingarnar longur út. Tær mugu og skulu byrja 1. januar 2018. Hinvegin fara vit við eini skiftistíð og á annan hátt at tryggja, at broytingarnar komandi árini henda eftir einum skipaðum leisti, sum allir partar kunnu kenna seg tryggan við.

Fiskiríkidømið er ogn Føroya fólks. Høvuðsamboðini at tryggja, at vinnan gerst handilslig, eru tvær uppboðssølur – onnur skal umsita og selja veiðurættindi, hin sjálva veiðuna. Best er, um tær frá byrjan hava øll rættindi og alla veiðu um hendi, men tær skulu sum minstamát umsita ein vaksandi part.

Fyri at teir núverandi stóru leikararnir í fiskivinnuni kunnu fáa umstøður at laga seg til nýggjar tíðir, fara vit at arbeiða fyri, at teimum í skiftistíðini verður tryggjaður ein forkeypsrættur til ein part av veiðurættindunum. Hesin parturin fer at minka ár fyri ár. Prísásetingin fyri hendan forkeypsrættin verður kortini marknaðarstýrd og ikki eitt politiskt ásett tilfeingisgjald, sum valdast tað krónutal, sum vantar í almenna búskapinum.

Framsókn heldur, at millum annað hetta skal eyðkenna nýggju fiskivinnuskipanina:

- Fiskivinnan skal vera lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygg.
- Skipanin skal verða gjøgnumskygd og tryggja, at samfelagið sum heild fær sum mest burtur úr føroysku fiskastovnunum og veiðurættindum í fremmandum ella altjóða sjógvi.
- Skipanin skal eisini tryggja, at nýggir virkisfúsir og dugnaligir leikarar sleppa upp í vinnuna.
- Veiðurættindi og veiða skulu seljast gjøgnum uppboðssølur, sum tryggja marknaðarstýrdar prísir. Peningurin frá sølunum skal fara í ein búskapargrunn og ikki beinleiðis í almenna rensilð. Fiskimaðurin skal ikki vera við til at gjalda fyri veiðurættindi.
- Rættindini kunnu verða seld við ymsari støðd og við rímiliga stuttari loyvistíð.
- Verandi havarar av veiðurættindum skulu í eini skiftistíð hava forkeypsrætt til ein minkandi part av rættindunum. Politiska skipanin skal semjast um ymsar aðrar treytir í skiftistíðini.
- Bara uppboðssølan kann selja veiðurættindi. Loyvishavarar kunnu ikki selja tey sínamillum. Óbrúkt rættindi skulu latast tí almenna aftur eftir greiðari skipan.
- Føroyskt skrásett skip skulu veiða fiskin. Umborð skulu føroyskar treytir og sáttmálar galda. Veiðan skal í høvuðsheitum um føroyskan bryggjukant, og hon skal altíð sum minstamát umvegis eitt landingarstað við góðkendum eftirliti.
- Útlendskur kapitalur skal í minst møguligan mun vera í veiðiliðinum.

## FERÐAVINNAN SUM BRENNIEVNI

Tað privata og tað almenna kunnu saktans samstarva um at byggja upp vinnur, sum gagna øllum samfelagnum, hóast vinnurnar sjálvar skulu verða riknar í privatum høpi. Hetta verður dúgliga gjørt í okkara grannalondum við góðum úrslitum.

Almenna arbeiðið at leggja dyggari lunnar undir ferðavinnuna er eitt spennandi arbeiði í so máta. Hetta endurspeglar málsetingin hjá Visit Faroe Islands um (1) at økja umsetningin í føroysku ferðavinuni úr umleið 400 milliónir krónum í 2011 upp í eina milliard krónur

í 2020; (2) at vaksa talið á gistingum úr 90.000 upp í 200.000; og (3) at skapa 450 nýggj arbeiðspláss í vinnuni.

Í sannføringini um, at hann, sum sáar, eisini heystar, taka vit undir við hesi ætlan. Vit vita, at ein lønandi ferðavinna fer at eggja til vørumenning, fakliga menning og áhugan at gera íløgur. Hetta er vinnan, sum fram um aðrar ávirkar bæði hjávinnur og lív og framburð kring alt landið.

Vit fara at arbeiða fyri, at ferðavinnan gevur eitt støðugt vaksandi íkast til landshúsarhaldið. Vit ásanna, at tilgongdin er drúgv, og at tað tí er umráðandi, at vinnan fær tryggar karmar og frið at røkka málunum. Tað er umráðandi, at tað privata sum frálíður stjórnar vinnuni og tryggjar, at lønsemi er í henni.

Vit skulu tryggja, at vit varðveita eina holla javnvág millum vinnuna og náttúru og umhvørvi okkara. Vit fara at virka fyri, at ferðavinnuútbúgvingar gerast partur av vinnuskúlatilboðum okkara.

## MATSTOVURNAR SUM AMBASSADUR

Tað sømir seg einum landi, sum livir av framleiða matvørur, at hava framkomnar matstovur. Vit fegnast um, at matstovurnar og kaféirnar hava ment seg so nógv hesi seinastu árini, millum annað takkað verði teirri liberaliseraðu lóggávuni viðvíkjandi øli og víni.

Í dag er hendan vinnan rættiliga fjølbroytt og fevnir um at kalla alt frá smáum hugnaligum kaffistovum, sum stimbra skapanarevni og hugflog, til matstovur í heimsklassa, sum eru við til at seta land okkara á heimskortið. Í vinnuni starvast nógv ung fólk, sum bæði fakliga og persónliga vilja bjóða verðini av innan bæði tænastustøði og fjølbroytni.

Framsókn arbeiðir fyri at styrkja vinnuna enn meira. Matstovurnar skulu hava loyvi til sjálvar at flyta inn øl og vín eftir ynskinum hjá gestunum. Vit skulu lækka MVG á teirra tænastum, so tað samsvarar við avgjøldini í grannalondunum. Hetta fer bæði at stimbra hugin hjá føroyingum at fara út at eta og at styrkja evnini hjá ferðavinnuni at kappast um at fáa ferðaløg og ráðstevnugestir til Føroya. Vit skulu eisini skipa fyri hollari og fjølbroyttari frálæru innan matstovuvinnuna.

## KREATIVAR ÚTFLUTNINGSKRÓNUR

Hóast tær kreativa vinnurnar hava ment seg nógv tey seinastu mongu árini, eru tær enn ov ósjónligar í samfelagsbúskapinum. Løtan er komin til av álvara at skapa útflutningskrónur burtur úr teimum, eins og grannalond okkara gera. Eisini á hesum øki ber væl til hjá tí privata og tí almenna at samstarva um eina munandi professionalisering innanlands og eina miðvísa útbreiðslu uttanlands.

Fyri at fáa sonevndan mentanarútflutning burtur úr handverkslist, sniðgeving, tónleiki, filmslist og øðrum kreativum virksemi, skulu vit eggja virkisfúsum útlendskum bransjufólkum at koma higar at uppliva hetta virksemið og síðani at velja tað besta burturúr, eins og vit skulu eggja føroyingum at fara í onnur lond at skapa sambond. Vit skulu leggja lunnar undir og menna eitt støðugt millumtjóða samskifti.

Frá politiskari síðu skulu vit virka fyri møguleikunum at bjóða frálæru í løgfrøði, marknaðarføring og búskapi innan kreativar vinnur. Tað almenna kann eisini samstarva við vinnurnar um at miðsavna serkunnleikarnar á einum staði, har tær kunnu fáa ráðgeving og verða motiveraðar. Her ber til at bjóða vitan um løgfrøðilig vandamál, upphavsrætt, patent, lisensar, stuðulsmøguleikar, grunnar, førleikamenning innan listaøkini og vinnuliga partin, sýnisgluggatiltøk og annað.

## NEYÐUGT VIÐ NÝGGJUM VINNUM

Framkomin lond brúka millum annað talið á nýskapandi fyritøkum, patentum og tílíkum til at sammeta seg við onnur framkomin samfeløg. Eisini í Føroyum tosa vit nógv um nýskapan og íverkseting, men við hesum hugtøkum fyri eyga eiga vit at samskipa samstarvið millum privat og alment munandi betur. Ein jalig avleiðing av hesum er, at eins og tílíkar vinnur stava frá skapandi og virkisfúsum fólkum, draga tær enn fleiri tílík fólk at sær.

Føroyingar hava bæði hollan lærdóm og dyggar royndir á fleiri økjum, sum kunnu leggja lunnar undir nýggjar vinnur. Ein framkomin matvøruvinna og heimsins besti sjómansskapur eru millum dømini, men eisini innan eitt nú KT hava vit bæði vællærd og skapandi fólk.

Tað er sjálvandi eisini avgerandi neyðugt, at bæði tað almenna og tær stóru vinnurnar ikki arbeiða beinleiðis

ímóti menning av nýggjum vinnum. Hetta var tað, sum hendi, tá peningastovnarnir við almennum loyvi fluttu KT-tænasturnar frá Elektron av landinum. Framsókn fer at virka fyri at koma Føroyum burtur úr aftur teimum óhepnu avleiðingunum av hesum avgerðum.

## EIN STERKARI PRIVATUR GEIRI

Í Føroyum er lutfallið millum almenna og privata partin av samfelagsbúskapinum púra avlagað og ikki í samsvari við tað, sum krevst fyri at reka eitt tíðarhóskandi samfelag. Telja vit tey almennu partafeløgini við, situr tað almenna á 75-80 prosentum av búskapinum.

Framsókn virkar fyri, at privati geirin skal vaksa munandi, bæði veruliga og lutfalsliga. Umframt við vinnumenning av ymsum slagi, kann hetta gerast við bæði einskiljingum og við útveiting av almennum tænstum.

Nógvar uppgávur, sum tað almenna í dag loysir, kunnu við stórum fyrimuni verða røktar – heilt ella fyri ein part – av privatum. Framsókn tekur undir við prinsippinum um, at almennar veitingar fylgja tí einstaka, sum síðani í so stóran mun, sum tilber, sjálvur kann velja, hvørjum hann fær tænastuna frá.

Umframt at hetta styrkir vinnuna, kann brúkarin fáa gagn av kappingini um at røkja tænasturnar, eins og hann sum skattaborgari fær ein møguleika at gera sær greitt, hvat ávísar dygdir í veruleikanum eiga at kosta.

## EIN TÍÐARHÓSKANDI APOTEKSTÆNASTA

Apotekstænastan er eitt dømi um eitt øki, sum kann verða liberaliserað við stórum fyrimuni fyri allar føroyingar.  Almenna apoteksverkið hevur í løtuni einkarrætt til at selja heilivág í Føroyum, og tað er ikki sørt, at fólk merkja hetta á ein neiligan hátt.

Í grannalondunum eru hesar tænasturnar liberaliseraðar, og vit finna har nógv privat apotek. Framsókn virkar fyri at gera broytingar á hesum øki í Føroyum. Men av tí at apotekini reka eitt sera kritiskt virksemi, skulu broytingarnar gerast við nærlagni, og vit fara fyrst at taka stig til eitt arbeiði at greina viðurskiftini væl.

Ímeðan eigur almenna apoteksvirksemið at tryggja sínum brúkarum betri tænastur. Hetta kann tað millum annað gera við at lata útbúgvin og góðkend privat vinnurekandi  sleppa at selja heilivág og aðrar apoteksvørur í einum samstarvi við tað almenna apotekið.

# TJÓÐSKAPARLIGA FRÆLSIÐ

Vit eiga at byggja tjóð í einum og øllum, sum vit takast við. Tað er í strembanini eftir at standa á egnum beinum, at vit fáa tann størsta framburðin. Framsókn vil, at Føroyar gerast fullveldi og fullgyldigur limur í altjóðasamfelagnum við øllum teimum rættindum og skyldum, sum tað ber í sær. Fyrsta stigið er, at vit einaferð fyri allar staðfesta, at í Føroyum ræður Føroya fólk. Harafturat mugu vit tryggja, at búskapurin, mentanin, sosialu viðurskifti okkara og náttúra og umhvørvi eru burðardygg og framtíðartryggjað.

## Í FØROYUM SKULU FØROYINGAR RÁÐA

Í Føroyum skal eingin vera oman fyri ella undir liðini á okkum. Vit skulu ikki longur hava eina heimastýrisskipan, har danska Fólkatingið útveitir okkum nakrar heimildir til at taka avgerðir í egnum landi. Núverandi ríkisrættarliga støðan má halda uppat.

Tað er ómakaleyst hjá okkum at taka hetta stigið. Vit skulu alt fyri eitt fara undir at gera nýggju stjórnarskipanina lidna. Eftir drúgvt serfrøðiligt og politiskt fyrireikingararbeiði vantar nú ikki nógv í, og møguleikarnir fyri breiðari semju millum politisku flokkarnar eru góðir. Løgtingið skal gera viðgerðina lidna og síðani lata uppskotið fara út til fólkaatkvøðu, so Føroya fólk kann taka endaligu avgerðina.

Vit fara at virka fyri, at stjórnarskipanin kemur í gildi alt fyri eitt. Tá tað er hent, eru tað vit – Føroya fólk – sum útveita til danskar myndugleikar at fyrisita ávís viðurskifti í okkara landi, og ikki øvugt. Hvussu vit føroyingar síðani brúka okkara nýggja vald, er upp til hvønn einstakan føroying ella politiskan flokk at taka støðu til. Hjá Framsókn er málið fullveldi.

## FØROYAR SJÁLVAR HELDUR ENN HÁLVAR

Vit skulu yvirtaka og reka okkara egna uttanríkispolitikk. Ein týðandi partur av okkara framtíð verður evnaður til uttan fyri landoddarnar ella í samstarvi og samskifti okkara við umheimin. Vit skulu tí hava ein miðvísan uttanríkispolitikk, sum styrkir okkara sjálvsfatan og

virðing, gevur okkum altjóða vitan og perspektiv og mennir okkara vinnu, sølu og búskap.

Vit skulu savna eina føroyska uttanríkistænastu í eina sterka kjarnu við egnum uttanríkisráðharra. Í samstarvi við onnur viðkomandi stjórnarráð, stovnar og vinnu skal uttanríkisráðið samskipa allar samráðingar við umheimin um tilfeingi, handilssáttmálar og millumtjóða samstørv. Ráðið skal umboða Føroyar og stuðla undir sølu og útflutning. Tað skal eisini savna og samskipa millumtjóða vitan og veita føroyskum stovnum og fyritøkum ráðgeving um altjóða viðurskifti.

Føroyar skulu sita við borðið, tá avgerðir verða tiknar, sum viðvíkja okkum. Vit skulu stremba eftir sjálvstøðugum limaskapi í norðurlendskum, europeiskum og alheims stovnum og felagsskapum á øllum økjum, sum eru viðkomandi fyri okkum.

Føroyar skulu endurskoða allar handilsavtalur. Vit skulu samráðast um fullkomnan fríhandil við ES, men ikki um limaskap. Haraftur skulu vit stremba eftir sterkari støðu á nýggjum og skjótt vaksandi marknaðum.

Til at náa hesum málum skulu Føroyar víðka netið av egnum sendistovum og sjálvstøðugum samstarvi við aðrar sendistovur. Hetta virksemið skal vera avriksrikið og í størri mun fíggja seg sjálvt.

## VIT YVIRTAKA ÚTLENDINGAMÁL

Framsókn virkar fyri, at Føroyar taka fulla ábyrgd av útlendingamálum, og at tey verða fyrisitin eftir føroyskari lóggávu. Vit fáa tá neyðuga vitan og førleikar at føra ein politikk, sum tekur støði í føroyska samfelagnum. Tað fer at geva okkum eina betri, skjótari og virðiligari viðgerð av øllum umsóknum frá útlendingum. Hetta verður gagnligt fyri bæði hin einstaka og samfelagið.

Góðar integratiónsskipanir skulu tryggja, at Føroyar fáa gagn av virkisfúsum útlendingum, eins og teir fáa gagn av at búgva og virka her.

Sum ein fullgyldugur partur av altjóðasamfelagnum skulu vit eisini taka ábyrgd í tí ólukkuliga flóttafólka-spurninginum. Vit skulu gera eina fimmára ætlan fyri, hvussu vit handfara og reka hetta fløkta og trupla málið. At taka lut í hesum fyrireikingararbeiðinum fer í sjálvum sær at geva okkum vitan og royndir, sum fara at stuðla undir, at vit taka skilagóðar avgerðir. Vit skulu útbúgva okkara egna fólk til at meta um, hvat best er at gera til frama fyri flóttar úti í heimi ella her í Føroyum. Vit skulu duga at stjórna, um nakrir teirra koma higar, soleiðis at teir hava góðar umstøður til at gerast ein partur av okkara samfelag, soleiðis sum vit ynskja at reka tað.

## BURTUR ÚR BÚSKAPARLIGU SVEIGGJUNUM

Tjóðin gerst ikki fræls, um vit binda hana niður í skuld til aðrar tjóðir ella til millumtjóða stovnar. Vit mugu framtíðartryggja landið við at reka ein búskaparpolitikk og ein fíggjarpolitikk, sum eggja ungum familjum at verða verandi her ella at koma higar, samstundis sum vit framtíðartryggja ta frælsu tjóðina.

Vit mugu eisini gera tað liviligari í Føroyum við at tálma búskaparligu sveiggini heldur enn at stuðla undir tey í hvørjum einasta tíggjuáraskeiði. Framsókn fer enn einaferð at arbeiða fyri at fáa eina konjunkturlóg, sum minkar um sveiggini, og ein búskapargrunn, sum stuðlar undir javnari fíggjarlógir.

## FÍGGJARMÁL

Hóast Framsókn í prinsippinum er fyri eini skattaskipan, sum er "fløt" og ikki brandskattar tær seinast vunnu krónurnar hjá tí einstaka, harmast vit um tann týðiliga sosiala skeivleikan, sum fráfarandi samgongan framdi við sonevnda flatskattinum. Hann var eisini óheppin í mun til tann samfelagsbúskapin, sum vit høvdu tá. Hetta, tí at hann ikki eisini kom teimum til góðar, sum høvdu hann mest fyri neyðini, og sum tí høvdu havt brúkt hann til at fáa ferð á føroyska búskapin.

Í løtuni hevur búskapurin ikki brúk fyri, at vit frá almennari síðu seta ferð á hann. Tí ber illa til at lækka skattatrýstið sum heild, og tað er tí í løtuni ein stór avbjóðing at fremja broytingar i skattaskipanini, sum lætta um hjá teimum lág- og meðalløntu.

Framsókn fer kortini at virka fyri, at bøtt verður um korini hjá hesum bólkum, uttan at samlaða skattatrýstið minkar. Tað kunnu vit gera, við at tað almenna á summum økjum tekur peningin inn við brúkaragjøldum heldur enn at fíggja tey við inntøkuskatti. Her hugsa vit kortini ikki um tær heilsu- og almannatænasturnar, sum eru so nógv umrøddar í seinastuni.

Ein sera stórur partur av føroyingum arbeiðir uttanlands. Av teimum siglir størsti parturin við fremmandum handilsflotum. Tað er í sær sjálvum ein styrki fyri føroyska búskapin at fáa hesar inntøkur uttaneftir. Samstundis er tað ein nógv størri avbjóðing fyri almenna føroyska húsarhaldið enn fyri onnur lond, at útlendsku skipanirnar ikki geva føroyska búskapinum skattin fra sjómonnum, samstundis sum teir og familjur teirra brúka almennar tænastur her heima. Vit eiga at kanna, um vit við millumlanda samráðing kunnu fáa ein part av skatti teirri til Føroya so ella so.

Til tess á annan hátt at møta hesi avbjóðing fer Framsókn at virka fyri einum grundleggjandi arbeiði fyri at kanna, hvussu vit kunnu rinda fyri summar almennar tænastur á annan hátt enn við lønarskatti.

Vit fara eisini støðugt at meta um skattatrýstið. Við meira miðvíst at fylgja konjunkturinum skulu myndugleikarnir gerast betur førir fyri at meta um trýstið og um, nær teir møguliga eiga at hækka ella lækka skattin.

Í Føroyum eru vit vælsignað við ovurstórum náttúrutilfeingi. Leggja vit tey saman við tí tilfeinginum, sum vit við miðvísum uttanríkispolitikki og einum professionellum samráðingartoymi skaffa okkum atgongd til í fremmandum og millumtjóða sjógvi, eiga vit náttúruvirði, sum eru sera høg fyri hvønn íbúgva. Hetta skal verða endurspeglað í inntøkunum hjá tí almenna. Inntøkur frá uppboðssølunum av rættindum og veiðu skulu tó koma umvegis búskapargrunnin og ikki sum eitt gjald, sum vit á hvørjum ári áleggja vinnuni sum eina ífyllu í landskassan.

## TAÐ ALMENNA SKAL SKIPAST AV NÝGGJUM

Vit skulu fara undir at fremja tær nýskipanirnar í almenna geiranum, sum vit nú hava tosað nóg leingi um. Tað veri seg í miðfyrisitingini, kommunubygnaðinum, skúlaskapinum, pensjónsskipanini, heilsuverkinum og aðrastaðni. Hetta skal geva føroyingum betri tænastur og samstundis tryggja okkum eitt gott haldføri í búskapinum.

Framsókn fer at virka fyri, at vit fáa eitt samlað sjúkrahúsverk undir einari og somu leiðslu. Landsjúkrahúsið er og skal vera meginsjúkrahús. Serfrøðin skal taka støðu til, hvør funktión kann og skal vera í Klaksvík og á Tvøroyri. Atlit kann takast til gagnið av lokalum arbeiðsplássum, men sjúklingurin skal vera í miðdeplinum. Endamálið skal vera at veita eina so góða viðgerð, røkt og tænastu, sum tilber, á einum fakliga og fíggjarliga rationellum grundarlagi.

Neyðugt er eisini at leggja skúlar saman í størri eindir. Vit hugsa her ikki so nógv um bygningar, men meira um at samskipa tilboðini, so tey gerast hollari og breiðari. Vit eiga at umhugsa at lata kommunurnar átaka sær at reka fólkaskúlarnar. Hetta kann vera ein partur av teirri miðspjaðingini, sum leitað verður eftir innan tað almenna. Hetta krevur størri kommunalar eindir, men vit eiga undir øllum umstøðum at minka talið á kommunum og at fremja fleiri aðrar rationaliseringar, so føroyingar fáa meira fyri minni.

Vit skulu støðugt meta um, hvussu vit við fyrimuni kunnu laga almenna geiran til, so vit brúka starvsfólk og annað tilfeingi so væl, sum vit kunnu. Av tí at føroyingar eins og onnur ynskja sær alsamt fleiri og betri tilboð og tænastur, skulu vit eisini støðugt meta um, hvørt verandi tænastur eru í samsvari við tørv og ynski ella ikki.

## PENSJÓNIRNAR SKULU UPP Á PLÁSS

Ein hin mest átrokandi avbjóðingin er pensjónsnýskipanin. Framsókn hevur sum heild tikið undir við tí arbeiði, sum Almannamálaráðið hevur gjørt, og vit hava eisini aktivt tikið lut í tí. Men her má meira ferð setast á.

Fyri ikki at skjóta avgerandi neyðug stig longur út í framtíðina hevur Framsókn atkvøtt fyri og tikið meðábyrgd av, at føroyingar fara undir at gjalda inn til sína egnu pensjón. Nú ræður um at finna semjur um, hvussu pensjónirnar skulu verða fyrisitnar og goldnar út aftur í framtíðini. Vit mugu tryggja, at skipanin kennist rættvís – bæði mótvegis teimum, sum spara saman til egna pensjón og teimum, sum í størri mun hava fólkapensjónina at dúva á.

Av tí at okkum kemur at tróta arbeiðsmegi í Føroyum í komandi tíðum, skulu vit bera so í bandi, at tað skal loysa seg hjá fólki at arbeiða eftir formligan pensjónsaldur, hava tey hug og heilsu til tess.

## LOFTRÚMIÐ ER OKKARA

Í 2012 tók løgtingið undir við einum uppskoti til samtyktar hjá Framsókn um, at landsstýrið skal arbeiða fyri at yvirtaka føroyska loftrúmið. Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri bæði føroyskar og danskar myndugleikar hevur skrivað eitt álit, sum vísir á gongdar leiðir. Tíverri er millum lítið og onki hent síðani.

Framsókn fer framhaldandi at brúka nógva orku til hetta málið. Fyrsta stigið er alt fyri eitt at yvirtaka fyrisitingina av inn- og útflúgvingarøkinum. Eingin forðing er fyri tí. Tá avtornar, skulu vit sjálv taka ábyrgdina av øllum tí føroyska loftrúminum. Hetta gera vit í teirri sannføring, at vit harvið skapa nógv nýggj og vitanartung arbeiðspláss í Føroyum, og at vit menna føroysku flogvinnuna sum heild.

## VIT EIGA TÆR VIÐKVOMU UPPLÝSINGARNAR

Eins og í øllum øðrum samfeløgum er virkisførið í føroyska samfelagnum meiri og meiri treytað av talgildari kunningartøkni og samskifti um alnótina.

Hendan tøknin og hetta samskiftið fevna um eitt ótal av viðkvomum upplýsingum. Tey fevna um persónlig, sosial, heilsulig, búskaparlig, løgfrøðilig og onnur viðurskifti, sum hava stóran týdning fyri bæði hvønn einstakan okkara og alt samfelagið.

Saman við fyrimununum av altjóðaøgerðini og kunningartøknini fylgir eisini tann vansin, at einstakar vanlukkur, skaðahendingar, skipað brotsverk, yvirgangur, krígsstøður o.l. kunnu fáa álvarsligar avleiðingar fyri virkisførið samfelagsins. Framsókn heldur tað tí vera átrokandi neyðugt, at hesar upplýsingar verða væl vardar og tryggjaðar, og at tær sum meginregla verða goymdar í Føroyum. Vit ynskja ikki at lata upp í hendurnar á einum útlendskum KT-veitara at tryggja okkum móti eini samfelagsligari vanlukku.

Tað hevur stóran týdning, at føroyskir myndugleikar kunnu lóggeva um føroyskar upplýsingar, og tað er eyðsæð, at hetta gerst munandi truplari, um tær verða goymdar uttanlands. Hetta ger eisini, at føroyingar missa førleikarnar at goyma og viðgera slíkar upplýsingar undir tryggum umstøðum.

Framsókn virkar tí fyri, at viðkvæmar upplýsingar skulu goymast og viðgerast í Føroyum, og at tað verða sett serliga herd krøv til at tær verða tryggjaðar ímóti at forfarast. Ein jalig avleiðing av hesum er, at vit menna førleikar og skapa møguleikar fyri fleiri hávitanararbeiðsplássum.

## EITT FRAMKOMIÐ OG VÆLLÆRT FÓLK

Týdningarmesta tilfeingið hjá teirri frælsu tjóðini eru føroyingar og onnur, sum velja at búgva og virka her. At menna og útbúgva okkara fólk er tí tann besta íløgan, vit kunnu gera, og avkastið er nógv størri, enn vit kunnu ímynda okkum. Framsókn virkar fyri eini lívslangari menning og læring "úr vøggu í grøv".

Hendan menningin fer millum annað fram á dagstovnunum. Vit halda tað vera sera umráðandi, at børn og foreldur her fáa eina fyrstafloks tænastu, sum hvílir á eini tíðarhóskandi námsfrøðiligari grund. Barnaskúlin er grundin undir øllum skúlaskapi. Vit fara at endurskoða fólkaskúlan, bæði hvat lærugreinum og bygnaði viðvíkur.

Miðnámið fyrireikar av álvara okkara ungu at taka ábyrgd av teirri frælsu tjóðini. Vit fara at eftirmeta skipanina við breytum og yrkismiðnámi fyri at tryggja, at vit brynja hesi ungu so væl, sum tilber.

Lærarar og leiðslur í bæði barnaskúlanum og á miðnámi skulu hava bestu fortreytir fyri førleikamenning. Ein

støðug eftirmeting og gransking skal tryggja okkum, at vit í Føroyum hava bæði ein góðan tíðarhóskandi fólkaskúla og ein miðnámsskúla, sum fyrireikar okkara unga fólk at taka við stórum ábyrgdum.

Vit fara at virka fyri einum betri samstarvi millum ymsar kreftir í samfelagnum fyri at styrkja okkara skúlaskap. Vit halda tað vera vert at kanna eftir, um vit kunnu skipa bæði skúlaskapin og skúlaárið soleiðis, at tað hóskar betur til føroysk viðurskifti, siðvenjur, árstíðir, arbeiðsmarknaðin og aðrar tættir. Ovast fara vit at raðfesta eitt føroyskt undirvísingartilfar, sum altíð er tíðarhóskandi.

## BÓKLIG OG VERKLIG MENNING

Framsókn miðar eftir framhaldandi at styrkja hægri lestur og gransking, bæði hvat játtanum og ymsum samstørvum viðvíkur. Fróðskaparsetur Føroya skal hava eina stabila og hóskandi játtan, sum tryggjar eina støðuga menning av øllum akademiskum stigum – bæði BA, MA/Kandidat og PHD/gransking. Vit skulu hava eitt universitetskampus og lestraríbúðir eins og kappingarføran lestrarstuðul.

Vit skulu styrkja og fjølga um verkligu og vinnuvendu útbúgvingarnar. Tær eru lyklar til menning av einum fjøltáttaðum føroyskum vinnulívi og til tættari samstørv millum útbúgving og arbeiðsmarknað. Her er talan um virðismiklar íløgur til stórt gagn fyri samfelagsbúskapin.

Saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum skulu myndugleikarnir eisini menna fleiri útbúgvingar til vaksin. Tær skulu skipast eftir grundregluni um ta lívslongu læringina og eisini fevna um eina støðuga førleikamenning. Allir føroyingar skulu uttan mun til byrjunarstøði hava høvi til at útbúgva og menna seg. Ein týdningarmikil táttur í hesum er, at vit hava eina holla førleikameting, sum virðismetir førleikar og royndir hjá øllum føroyingum, eisini har tey ikki eru endurspeglað í formligum prógvum.

Gongdin at styrkja integratiónina av nýkomnum borgarum skal eisini fevna um undirvísing, so nýggju borgararnir kunnu læru mál og mentan okkara á ein viðkomandi og náttúrligan hátt. Vit fara eisini at virka fyri, at føroyska samfelagið kann fáa nógv størri gagn av teimum útbúgvingum og førleikum, sum hesir borgarar hava nomið sær í einum øðrum landi, og soleiðis fáa nyttu av øllum tí tilfeingi, sum í dag ikki fær fótin fyri seg á ymsum føroyskum fakøkjum. Framsókn heldur tað vera avgerandi, at eisini vinnulívið og onnur taka virknan lut i hesum. Hetta er ikki ein útreiðsla, men ein íløga, sum gagnar øllum pørtum.

## MÁL OG MENTAN ERU OKKARA SAMLEIKI

Eitt tíðarhóskandi samfelag stimbrar sálina í tí fólkinum, sum skapar tað. Føroyingar hava eina íborna drívmegi og ein viðføddan vilja og skapanarevni, sum eru endurspeglað í okkara serligu mentan. Hendan mentanin er okkara samleiki, sum myndar okkum mótvegis umheiminum. Hon leggur eisini lunnar undir okkara trivnað og avgjørt eisini samfelagsbúskapin, bera vit okkum rætt at. At brúka orku til mentanina er ein íløga og ikki ein útreiðsla. Í fleiri førum kann tað enntá vera ein beinleiðis íløga í útflutningskrónur, sum vit hava nevnt í partinum um vinnuligt frælsi.

Tað, at vit – so fáment vit eru – eiga eitt livandi og tíðarhóskandi mál, er einki minni enn ein tjóðskapar–ligur sigur, og hann er ikki sjálvsagdur. Tí tekur Framsókn undir við átøkum, sum hava til endamáls at røkja málið, so tað støðugt er livandi.

Framsókn virkar fyri at tryggja øllum góðar karmar, sum røkja, menna, savna, skjalfesta, varðveita og miðla okkara mál og mentan – bæði okkara mentanararv og samtíðarmentanina. Vit fara at tryggja, at Føroyar støðugt hava ein tíðarhóskandi mentanarpolitikk. Hann skal millum annað tryggja, at vit hava viðkomandi útbúgvingar og førleikamenningar innan mentan, list og kreativar vinnur.

Framsókn fer at virka fyri, at Tjóðpallur Føroya loksins fær sømilig kor. Vit fara at stimbra føroyska filmslist og framleiðslu av føroyskum miðlatilfari og øðrum føroyskum tilfari til bæði føroyingar og útlendingar.

Framsókn ætlar, at vit skulu fáa ein nýggjan stuðuls–politikk, og at vit endurskoða samlaðu fíggjarorkuna til mentanar- og listaøkið og fyrisitingina av henni. Stuðulspolitikkurin skal skilja ímillum fólksliga mentan og yrkislist. Stuðulin skal ikki verða fyrisitin beinleiðis av einum landsstýrismanni, men heldur av einum professionellum, partapolitiskt óheftum og fakliga grundaðum umhvørvi. Tað er avgerandi fyri eitt fram–komið samfelag, at listafólk hava umstøður, sum halda teimum til.

Ein partur av mentanarpolitikkinum er at orða ein politikk viðvíkjandi arkitekturi. Framsókn miðar eftir, at vit áseta eitt formligt krav um, at ein ávísur brotpartur av íløguni til ný- og útbygging av almennum bygningum skal verða brúktur til listprýðing.

## ÚRVALSÍTRÓTTIN SKAPAR MÁLSØKNI

Ítróttin hevur ein sera týðandi leiklut í okkara mentan og er við til at menna okkara ungdóm. Framsókn virkar fyri, at so nógvar ítróttagreinar, sum tilber, kunnu liva

og mennast í Føroyum. Vit eiga at eggja øllum teimum sjálvbodnu kreftunum, sum eiga heiðurin fyri, at vit eru so væl fyri á hesum øki.

Vit eiga at raðfesta einstaklingaítróttina hægri, enn vit hava gjørt. Føroyingar gera seg av álvara galdandi innan hesar ítróttir í altjóðahøpi og koma ikki so sjáldan heimaftur uttan úr heimi við heiðursmerkjum.

Vit eiga at skilja ímillum úrvalsítrótt (elituítrótt) og áhugaítrótt. Úrvalsítróttini tørvar nógva orku, skulu okkara ítróttafólk av álvara gera seg galdandi millum tey fremstu. Men hendan orkan er ein virðismikil íløga. Tey føroysku ítróttafólkini, sum við einum jarnvilja og biti og sliti stríða seg upp á altjóða tindar, eru ikki bara frálíkir ambassadørar fyri Føroyar. Tey eru eisini týdningarmiklar fyrimyndir, sum fáa okkum at trúgva uppá, at Føroyar saktans kunnu teljast millum fremstu tjóðir.

## UMHVØRVI OG ORKA

Vit mugu vera samhaldsføst mótvegis yngri og komandi ættarliðum. At byggja og varðveita einar frælsar Føroyar krevur, at vit fara væl um okkara náttúru og umhvørvi, og at vit brúka okkara náttúrutilfeingi á ein skilagóðan og burðardyggan hátt.

Fyri at framtíðartryggja bæði umhvørvið og búskapin skulu vit støðugt økja nýtsluna av varandi orku og minka um nýtsluna av brennievnum, sum tømast og harafturat dálka. Vit fara eisini at stremba eftir, at tað skal loysa seg betur og betur hjá einstaklingum, stovnum og virkjum at brúka tøkni og aðrar hentleikar, sum krevja lítla orku.

Vit stuðla undir burðardygd við at hava so nógva staðbundna framleiðslu, sum tilber. Hetta minkar um orkunýtsluna, samstundis sum tað skapar liv og trivnað í okkara umhvørvi.

Djórini eru ein týdningarmikil partur av okkara umhvørvi. Sum tíðarhóskandi samfelag skulu vit tryggja, at vit vísa eitt sømiligt fyrilit í allari viðferð av bæði húsdjórum, alidjórum og villinidjórum. Vit staðfesta tíverri, at nógv djór verða ikki nóg væl viðfarin, og vit halda, at djóraverndarlógin er ov gomul og ótíðarhóskandi. Framsókn fer at virka fyri, at vit endurskoða og dagføra lóggávuna. Misrøkt av og harðskapur móti djórum skal ikki vera partur av okkara samfelag.

RÚNI S. PATURSSON søluleiðari, Tórshavn

ÁSA HAMMERSHAIMB CHRISTIANSEN lesandi, Tórshavn

KARL A. OLSEN handilsskúlalærari, Vestmanna

HANNA JENSEN studentaskúlalærari, Norðagøta

SÁMAL PETUR Í GRUND skipari, Klaksvík

BERGUN KASS bankakvinna, Hoyvík

HØGNI REISTRUP samskiftisráðgevi, Tórshavn

POUL MICHELSEN stjóri og floksformaður, Tórshavn



SÚSANNA OLSEN námslektari, Tórshavn

KARLOT HERGEIRSSON skipsførari, Argir

SUNNEVA H. EYSTURSTEIN sjálvstøðug vinnurekandi, Tórshavn

POUL CLEMENTSEN floksskrivari, Tórshavn

RUTH VANG deildarleiðari, Tórshavn

HÁKUN ANDREASEN savnsteknikari, Leirvík

ODA W. ANDREASEN marknaðarfólk, Tórshavn

SÚSANNA KØTLUM hárfríðkanarkvinna, Tórshavn

BJARNI K. PETERSEN arbeiðsmaður, Tórshavn



# Ása Hammershaimb Christiansen



Yrki: Lesandi
Aldur: 28 ár
Bústaður: Tórshavn

Útbúgvin innan Politikk og Umsiting. Lesur master í løgfrøði á Fróðskaparsetur Føroya.

# Karlot Hergeirsson



Yrki: Skipsførari
Aldur: 42 ár
Bústaður: Argir

Karlot hevur verið við í Framsókn frá byrjan og siglir kring um í heiminum innan frálandsvinnuna.

# Bjarni K. Petersen

Yrki: Arbeiðsmaður
Aldur: 20 ár
Bústaður: Tórshavn

Bjarni hevur verið næstformaður í Framsøkin Ung síðan februar í fjør og varð í august mánaða valdur til formann.



# Bergun Kass

Yrki: Bankakvinna
Aldur: 55 ár
Bústaður: Hoyvík

Bergun hevur drúgvar royndir úr fíggjarheiminum, bæði sum starvsfólk í nevnd bankans og sum vanligt starvsfólk innan flest øll virkisøki. Bergun hevur eisini royndir innan almenna fyrisiting, og hevur umframt skrivstovu- og bankaútbúgving tikið útbúgvingar innan persónliga menning.



# Hákun Andreasen

Yrki: Savnsteknikari
Aldur: 50 ár
Bústaður: Leirvík

Hákun hevur einaferð áður stillað upp fyri Framsókn, tað var til kommunuvalið í Eysturkommunu í 2012. Hann er útbúgvin B.A. í søgu og siðsøgu.



# Hanna Jensen

Yrki: Studentaskúlalærari
Aldur: 42 ár
Bústaður: Norðagøta

Hanna er ein av stigtakarunum til Framsókn og vald í Eysturkommunu býrað á listanum hjá Framsókn. Hanna Jensen er forkvinna í Mentanarnevndini, varatingkvinna fyri Framsókn og næstforkvinna í Framsókn. Haraftrat er Hanna franskur konsul í Føroyum.



# Oda W. Andreasen



Yrki: Marknaðarfólk
Aldur: 43 ár
Bústaður: Tórshavn

Oda hevur drúgvar leiðslu- og arbeiðsroyndir frá ferðavinnuni bæði innanlands og uttanlands og eisini hevur hon royndir innan samskifti og leiðslu. Í løtuni nemur hon sær HD útbúgving.

# Høgni Reistrup



Yrki: Samskiftisráðgevi
Aldur: 31 ár
Bústaður: Tórshavn

Høgni er nýggjur í Framsókn, men hevur verið nógv at hoyrt seinastu árini serliga við bókini EXIT Føroyar, sum hann sjálvur annar ritstjórnaði.

# Karl A. Olsen



Yrki: Handilsskúlalærari

Aldur: 50 ár

Bústaður: Vestmanna

Karl var borgarstjóri í Vestmanna 2005–2012 og hevur verið varaborgarstjóri í Vestmanna síðan 2013. Karl er eisini nevndarlimur í SEV.

# Ruth Vang



Yrki: Deildarleiðari

Aldur: 49 ár

Bústaður: Tórshavn

Ruth stillaði upp fyrstu ferð til løgtingsvalið í 2011 og hon var eisini valevni til kommunuvalið í 2012. Ruth hevur drúgvar arbeiðsroyndir frá fíggjarvinnuni, heilsuverki og kommunalari fyrisiting á leiðarastigi.

# Sunneva H. Eysturstein



Yrki: Sjálvstøðug vinnurekandi

Aldur: 30 ár

Bústaður: Tórshavn

Sunneva stillaði upp fyrstu ferð til løgtingavalið í 2011 og hon var eisini valevni til kommunuvalið í 2012.

# Poul Clementsen



Yrki: Floksskrivari

Aldur: 52 ár

Bústaður: Tórshavn

Poul var ein av stovnarunum av Framsókn og hevur verið skrivari og hjálparfólk floksins frá byrjan. Hann hevur einaferð áður stillað upp fyri Framsókn, tað var til kommunuvalið í Tórshavn í 2012.

# Súsanna Køtlum



Yrki: Hárfríðkanarkvinna
Aldur: 38 ár
Bústaður: Tórshavn

Súsanna hevur einaferð áður stillað upp fyri Framsókn, tað var til kommunuvalið í Tórshavn í 2012.

# Sámal Petur í Grund



Yrki: Skipari
Aldur: 57 ár
Bústaður: Klaksvík

Sámal Petur sat sum landstýrismaður í mentanar- og samskiftismálum í tíðarskeiðinum 1994 til 1997 og var valdur tinglimur við løgtingsvalið í apríl 1998. Somuleiðis var hann landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum frá februar 2001 til juni 2002. Við seinasta løgtingsval var Sámal Petur valevni fyri Framsókn og hevur hann verið sum varamaður á tingi í verandi valskeiði.

# Rúni S. Patursson

Yrki: Søluleiðari

Aldur: 32 ár

Bústaður: Tórshavn

Rúni hevur einaferð áður stillað upp fyri Framsókn, tað var til kommunuvalið í Tórshavn í 2012.



# Súsanna Olsen

Yrki: Námslektari

Aldur: 55 ár

Bústaður: Tórshavn

Starvast á Fróðskaparseturi Føroya. Útbúgving innan stjórnmálafrøði, sálarfrøði og leiðslu.



# VITJA HEIMASÍÐU OKKARA Á WWW.FRAMSOKN.FO

Á heimasíðuni kanst tú millum annað fáa meira kunning um politikk og valevni okkara, umframt møguleika at lesa valgreinir teirra.